# Nýggjárshálvmarathon

**Veðrið var so gott, sum vónast kundi, tá hálvt marathon var runnið um vikuskiftið**

MARATHON
*tíðindaskriv*

Leygardagin skipaði Roysnið fyri fyrstu rennikappingini í ár, tí sonevnda Nýggjárshálvmarathon, har 23 luttakarar runnu tann 21 km langa teinin frá vegnum oman til Funningsfjørð og út á Tofta kei.

### Umstøðurnar góðar

Hóast veðurforsøgnin hevði hótt við regni og 13 m/s mótvindi, varð turt og stilli, meðan kappingin var. Góðu líkindini høvdu við sær, at tíðirnar yvirhøvur vóru góðar.

### Jonhard bestur

Í opna bólkinum løgdu tríggir mans seg skjótt á odda, Jonhard Larsen og Guttorm Sørensen úr Treyatinum og Cecil Weihe úr Bragdinum.

Komnir nakað longri enn hálvan veg drógu klaksvíkingarnir frá havnamanninum. Og til seinast var kappingin tí ein uppgerð millum Jonhard og Gutta.

Jonhard var stinnastur, tá avtornaði, og vann kappingina við tíðini 1 tíma 18,45 min. Hetta varð persónligt met hjá honum við góðum trimum minuttum. Gutti gjørdist nummar tvey við tíðini 1 tíma 18,56 min., og Cecil Weihe hevði 1 tíma 19,48 min. á triðja plássinum.

### Jósvein besti veteranur

Í veteranbólkinum, teir eru føddir í 1958 ella fyrr, var nokkso stórur munur millum tríggjar teir fremstu.

Jósvein Herup Olsen gjørdist nummar eitt við tíðini 1 tíma 28,26 min. Óli Olsen varð numar tvey við 1 tíma 32,11 min. og Steindor Hjaltalin nummar trý við tíðini 1 tíma 36,56 min. Teir renna allir fyri Bragdið.

### Cross Country 14. februar

Næsta rennikappingin verður ein sonevnd cross country kapping á Toftum 14. februar. Hetta er fyrstu ferð, skipa verður fyri einari slíkari kapping í Føroyum.

VÌF-VB 25-26 (12-11);

# Spenningur til seinasta bríksl



*VÍF stóð leingi við stigunum í hondini, men tær fullu at enda, og við fjórða plássinum á stigatalvuni eru FM-vónirnar av álvara farnar at kámast*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Kvinnuliðini hjá VÍF og VB borðreiddu við einum ordans "gysara" í høllini í Vestmanna leygardagin. Liðini fylgdust so at siga allan dystin, og dysturin bleiv ikki avgjørdur fyrr enn í seinastu sekundunum**

HONDBÓLTUR
*Terji Nielsen*

Tað var lagt upp til ein spennandi dyst í høllini í Vestmanna leygardagin, tá bestu kvinnuliðini hjá VÍF og VB hittust. Bæði liðini liggja ovarlaga á stigatalvuni, og haraftrat er støðan millum júst hesa bæði feløgini rættuliga spent av tí nógv umtala "útlendingamálinum".

### VB byrjaði best

Tað vóru gestirnir úr Vági, sum byrjaðu dystin best. Tá ið fyrri hálvleikur var nærum hálvrunnin, høvdu vágskvinnur lagt seg á odda 8-4. Men so tók verjan hjá heimaliðnum seg um reiggj, og serliga var tað rumenska Irina Raodvici,ið hevði gott tak á altíð vandamiklu Daivu á vinstra bakki hjá VB. Tað gekk tí heldur ikki long tíð, so hevði VÍF javnað til 8-8, millum annað takkað verið nøkrum góðum skjótálopum, sum endaðu við, at Nikolina Eyðbjørnsdóttir skoraði fyri heimaliðið.

### Nógv óneyðug bólttap

Nú fóru gestirnir úr Vági undir at mansverja Ioanu Rapa, og hetta tóktist at órógva álopsspælið hjá VÍF rættuliga nógv. Næstu løtuna gjørdu kvinnurnar úr Vestmanna einar fýra til fimm óneyðugar tekniskar feilir, sum tá ið alt kemur til alt kostaðu teimum dýrt. Bóltar blivu mistir út av vøllinum, ella onkrar avleveringar vóru so vánaligar, at tær endaðu í beinunum á viðleikarum.

Hinvegin kann sigast, at høvdu leikararnir hjá VB verið eitt sindur neyvari í seinnu helvt av fyrra hálvleiki, høvdu tær óivað havt eina trivaliga hálvleiksleiðslu, men tær megnaðu einans at skora tríggjar ferðir seinastu 15 minuttirnar undan steðginum. Her skal tó leggjast afturat, at gekk álopsspælið hjá VÍF ikki gott hesa løtuna, so var verjan sera stinn, eins og Adela í málinum hevði onkrar fínar bjargingar, og tað var hesum fyri at takka, at heimaliðið kundi fara til hálvleiks við einari leiðslu upp á eitt mál, 12-11!

### Dramatiskur seinni hálvleikur

Seinni hálvleikur byrjaði á sama hátt, sum tann fyrri endaði. Liðini skiftust um at hava leiðsluna, og sjáldan var meira enn tað eina málið á muni. Miðskeiðis í hálvleikinum gjørdi heimaliðið tó ein vørr, og brádliga var VIF á odda 21-18, og bert tólv minuttir vóru eftir at leika. Hetta tóktist tó ikki at nerva venjaran hjá VB tað stóra, tí hann tók eina time-out, og tríggjar minuttir seinni høvdu gestirnir javnað til 21-21!

Síðani skoraðu liðini upp á skift, VÍF var á odda 22-21, 23-22 og 24-23, áðrenn VB javnaði til 24.24. VÍF fór aftur í álop, men í hesum álopinum kom Aukse hjá VB ímillum eina langa avlevering, fór sjálv og legði VB á odda 25-24. Tveir minuttir vóru eftir at leika, og heimaliðið fekk brotskast í sínum næsta álopi. Tað setti liðskiparin, Sóley Mikkelsen trygt í netið til 25-25, og øll høllin var á gosi, bæði vestmenningar og vágbingar, sum vóru eins manssterkir og mælskir sum vestmenningarnir.

Í næsta álopinum hjá VB eydnaðist tað Lailu Jespersen at smoyggja sær inn um Ioanu í verjuni hjá VÌF og leggja gestirnar á odda 26-25. Vestmannakvinnur fóru nú aftur í álop, og hetta álopið endaði við, at Irina á strikuni hjá VÍF bleiv spæld frí, men Asta í málinum hjá VB stórbjargaði, og bert ein minuttur var eftir at leika. VB fór aftur í álop, men hesaferð átti Adela í VÍF-málinum tørn at stórbjarga, tá ið 20 sekund vóru eftir at leika. Sostatt fekk heimaliðið ein seinasta møguleika at tryggja sær ein javnleik, men hoppiskotið frá Ioanu trý sekund fyri leiklok fekk Asta í VB-málinum jústað út um baklinjuna, og harvið tryggja liði sínum bæði stigini, og frøin var stór á teimum mongu vágbingunum í høllini.

### VB hevði størri hugflog

Í einum so jøvnum dysti, er altíð trupult at meta um, hvørt sigurin var uppiborin ella ikki. Men serliga seinni hálvleikur í dystinum leygardagin vísti, at VB hevði størri hugflog í álopsspæli sínum enn hvat heimaliðið hevði. Til dømis hevði VÍF nærum ongar avsluttingar av vonginum, meðan VB hevði fleiri, sum eisini góvu mál.

Haraftrat tóktist tað heldur ongantíð sum um, at fjáltur kom á vágskvinnur, meðan VÍF hevði alt ov lítið tol í álopsspælinum.

Hinvegin kann væntandi breiddin í hópinum hjá VB gerast ein vansi seinni í kappingini. Henda væntandi breiddin sást einabest leygardagin, tá ið spælskiparin, Aukse, fekk ein snudd rættuliga tíðliga í dystinum, men spældi allan at kalla allan dystin, hóast sjónliga plága av snuddinum.

### Dysturin í tølum

**VÍF-VB 25-26 (12-11)**
**Málskjúttar**
**VÍF:** Sóley Mikkelsen 6(3), Irini Radovici 6, Nikolina Eyðbjørnsdóttir 4, Ioana Rapa 4(1), Fríða Marjunardóttir 3, Jackin Durhuus 2
**VB:** Daiva Tuomaite 9(2); Aukse Dysmauskaite 7(1), Gurið Mortensen 5, Laila Jespersen 3, Margreth Augustinussen 1.
**Brotskøst:** VÍF 5, VB 5
**Útvísingar:** VÍF 3, VB 2
**Dómarar:** Kári Hansen og Trygvi Mortensen, Tjaldur: Løgdu frá byrjan eina harða linju, og hana hildu teir gjøgnum allan dystin. Komu stak væl frá einari truplari uppgávu.



# Gulleggið varð av ongum

**Hondbóltssambandið misti møguleikan fyri fleiri hundrað-túsund krónum í lýsingarinntøkum, tá Sjónvarpið ikki segði seg hava stundir at producera dystin**

HONDBÓLTSPENGAR
*Jákup Mørk*

Tá tað fyri nøkrum mánaðum síðani var greitt, at Føroyar í HM-undankappingini í hondbólti vórðu bólkaðar saman við Noreg, var gleðin um lutakastið stór í Hondbóltssambandinum.

Ikki so nógv tí ítróttarligu útlitini vóru nakað serliga góð. Noreg verður jú roknað millum sterkastu hondbóltstjóðirnar, so Føroyar skuldu ikki gera sær nakrar vónir um stig her. Men fíggjarliga varð hetta roknað sum sannur gloypibiti. Norska TV2 hevur seinnu árini varpað allar dystirnar hjá landsliðnum beinleiðis, og tí var stórur møguleiki fyri lýsingarinntøkum, sum lógu nakað væl omanfyri tað, sum annars er gjørligt at fáa í kassan her í Føroyum.

### Sponsorar vilja síggjast

Men ætlaða gulleggið varð av ongum. Nýggjárskonsertin í Norðurlandahúsinum stóð fyri framman, og saman við valstríðnum viðførdi hetta eftir øllum at døma, at Sjónvarpið ikki segði seg hava møguleika at produsera og varpa dystin.

Eivind Jacobsen, formaður í HSF, var sum vera man harmur um støðuna, sum var íkomin, og hann duldi ikki fyri, at við hesum hevði hondbólturin í Føroyum mist ein gyltan inntøkumøguleika.

– Tær inntøkur, sum vit sjálvir kunnu skapa okkum í landsliðshøpi eru í ovurstóran mun tengdar at sponsorum. Og sponsorar vilja sjálvandi sleppa at verða sæddir. Tann møguleikan missa vit fyri ein stóran part, tá dystirnir ikki verða sjónvarpaðir, sigur hann.

Men talan var jú eisini um, at dysturin skuldi vísast í Noreg. Hevði tað ikki givið øktar møguleikar fyri lýsingum.

– Tað sigur seg sjálvt. Tá vildi tað kanska einamest verið norskar fyritøkur, sum keyptu sær lýsingarplássini, og tá vildi prísurin verið fleiri ferðir tað, sum føroyskar fyritøkur megna at gjalda, sigur Eivind Jacobsen, sum tó ikki vil seta tal á, hvussu nógv HSF kundi fingið inn á hendan hátt.

Hinvegin tykist hann ikki heilt avvísandi, tá spurt verður, hvørt tað snýr seg um nakrar hundrað-túsund krónur, so tað man ikki vera heilt av leið, um gitt veður, at missurin liggur eitt stað ímillum 200 og 300 tkr.



*Formaðurin í Hondbóltssambandinum mátti bara staðfesta, ætlaðu inntøkurnar hjá HSF av noregsdystinum vórðu av ongum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

### Útreiðslurnar niður

Spurdur beinleiðis, um nýggjárskonsertin var orsøkin til vantandi senditíðina, vildi formaðurin í HSF ikki gera stórvegis viðmerkingar.

– Teir (svf, blðm.) søgdu seg hava nógv at gera, og so var hetta altso ikki gjørligt, var einasta, sum formaðurin fekst at siga.

Men hvussu er og ikki, so ásannar formaðurin, at Hondbóltssambandið við hesum misti ein gyltan møguleika at skapa sær nakrar inntøkur.

– Vit høvdu sjálvandi vónað, at hesin dysturin kundi verða eitt gott ískoyti til raksturin hjá okkum. Men tær inntøkurnar eru so ikki til, og so mugu vit bara finna útav, hvussu vit kunnu skerja útreiðslurnar í aðrar mátar, sigur formaðurin í føroyska Hondbóltssambandinum at enda.

Eftir so spyrjandi hondbóltsáhugað, sum ikki duga at fata, hví tað ikki var gjørligt hjá Sjónvarpinum at senda frá dystunum. Onkur teirra tók til, at hetta neyvan hevði hent í fótbóltinum, um konsert og valstríð var samstundis, sum Frakland kom á vitjan. Tað er so neyvan nakað at fara skeivur av, men hinvegin vil tað neyvan vera ein dystur, sum Sjónvarpið sjálvt sleppur at framleiða.




Tilboðsferðir
frá Atlantic Airways

Vikuskiftisferð Vágar - Aberdeen

1.479,-
Íroknað ferðing fram/aftur og ferðaavgjald.

Bílegging áðrenn 12/3 2004. Annars í seinasta lagi 7 dagar áðrenn fráferð. Tilboðið er galdandi frá 15/1 til 22/3 2004.

2 fólk ferðast saman (annað kann vera eitt barn 2-15). 2-15 ár minus 33%, børn undir 2 ár minus 90%.

Í mesta lagi burtur í 3 dagar. Fráferð skal verða fríggjadag - heimferðin skal vera sunnudag.



Vikuskiftisferð til Keypmannahavnar

1.860,-
Íroknað ferðing fram/aftur og ferðaavgjald. Avgreiðslugjald á 220 kr. kemur aftrat prísinum.

Bílegging áðrenn 20/3 2004. Annars í seinasta lagi 7 dagar áðrenn fráferð. Tilboðið er galdandi frá 8/1 -29/3 2004.

2 fólk ferðast saman (annað kann vera eitt barn 2-15). 2-15 ár minus 33%, børn undir 2 ár minus 90%.

Í minsta lagi burtur náttina millum leygardag og sunnudag. Í mesta lagi burtur í 4 dagar. Fráferð skal verða hósdag, fríggjadag ella leygardag. Heimferð skal verða sunnudag ella mánadag.

Serlig APEX-ferð til Keypmannahavnar

2.360,-
Íroknað ferðing fram/aftur og ferðaavgjald. Avgreiðslugjald á 220 kr. kemur aftrat prísinum.

Bílegging áðrenn 20/3 2004. Annars í seinasta lagi 7 dagar áðrenn fráferð. Tilboðið er galdandi frá 8/1 - 29/3 2004

2 fólk ferðast saman (annað kann vera eitt barn 2-15). 2-15 ár minus 33%, børn undir 2 ár minus 90%.

Í minsta lagi burtur náttina millum leygardag og sunnudag. Í mesta lagi burtur í 14 dagar.

Bílegging hjá Atlantic Airways og á øllum ferðaskrivstovum.

Vanligir ferðaseðlar kunnu bíleggjast á atlantic.fo

ATLANTIC AIRWAYS
Flogvøllurin · FO-380 Sørvágur
Tel: 34 10 10 · Fax 34 10 01 · booking@atlantic.fo
www.atlantic.fo

SANSIR 355 355






Annika Olsen
valevni Fólkafloksins
í Suðurstreymoy

XA
FÓLKAFLOKKURIN

www.annikaolsen.net